Tórshavn, 15. mai 2025
**Tíðindaskriv frá Mentanargrunni Landsins**

# Stuðul til film

Til fyrsta stuðulsumfarið í 2025 hevur nevndin í Mentanargrunni Landsins tikið avgerð um at veita stuðul til 16 filmsverkætlanir. Stuðulsupphæddin, ið lutað verður út í hesum umfarinum, er 1.250.000 kr.

Samlaða filmsjáttanin fyri 2025 eru 4,6 mió. kr. Stuðul til film verður veittur fýra ferðir árliga.

Endamálið við stuðulsjáttanini er at framleiða og menna føroyskan film við denti á fiktiónsfilm, heimildarfilm og listafilm.

Nevndin hevur viðgjørt umsóknirnar eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 34 frá 30. apríl 2015 og kunngerð nr. 3 frá 6. januar 2025.

Við nýggju kunngerðini frá 6. januar 2025 um stuðul til film er tað Mentanargrunnur Landsins, sum umsitur stuðulsjáttan til film, og er hetta sostatt fyrsta stuðulsumfar, síðani heimildin er flutt til Mentanargrunn Landsins. Sum kunngerðin ásetur, hevur grunnurin sett tveir filmsráðgevar at meta um og gera tilmæli til grunnin. Avgerðin hjá nevndini um hvør fær stuðul stuðul til film, er bygd á tilmæli frá ráðgevunum.

28 umsóknir komu inn til fyrsta stuðulsumfarið, sum søktu um tilsamans 3.885.557 kr.

| Verkætlan | Slag | Umsøkjari | Kr. |
|---|---|---|---|
| Undirgangur #1 Sofía Nolsøe (Føroyar) | Stuttfilmur | Franklin Symphor Henriksen | 150.000 |
| $elfie | Eftirviðgerð | Gorm Just | 50.000 |
| Seyðahundur | Stuttfilmur | Svanna Christiansen | 135.000 |
| Til Midnáttarsang | Spælifilmur | Terji Mohr | 80.000 |
| Kom Ein Túr | Stuttfilmur | Brandur Teitsson | 10.000 |
| Menniskja | Heimildarfilmur | Rúna V. Højgaard | 50.000 |
| Vøllir | Heimildarfilmur | Jón Hammer | 150.000 |
| Three Rivers – poesifilmur – ein geopoetisk verkætlan | Listafilmur | Kim Simonsen | 80.000 |
| Kallað | Stuttfilmur | Jón Hammer | 150.000 |
| Halt um Meg | Stuttfilmur | Rógvi Rasmussen | 40.000 |
| Villar Dúgvur | Heimildarfilmur | Maria Winther Olsen | 30.000 |
| Reyna | Sjónvarpsfilmur | Torfinnur Jákupsson | 150.000 |
| Sansa | Stuttfilmur | Anna Joensen-Næs | 30.000 |
| Holding Hands | Heimildarfilmur | Barbara Lervig | 45.000 |
| SYNKRON | Spælifilmur | Marianna Mørkøre | 50.000 |
| Havsins Handverk – Fiskur fyri Framtíðina | Heimildarfilmur | Jørgen Neshamar-Asmussen | 50.000 |

Vegna nevndina
Hedvig Westerlund-Kapnas, forkvinna
Mentanargrunnur Landsins

MENTANARGRUNNUR LANDSINS
LÜTZENSTRØÐ 4 - FO-100 TÓRSHAVN - MENTAN@MENTANARGRUNNUR.FO - TLF. 320842 - 220845